tiðindablaðið **sosialurin**

Ábyrgdarblaðstjóri: **Jan Müller**
Fyritøksstjóri: **Kristjan Dahl**
Ljósmyndari: **Kalmar Lindenskov**

Blaðfólk: **Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Jóstinus L. Eldesgaard - Eydun Klakkstein - Eiríkur Lindenskov - Áki Bertholdsen**

Útgevari, uppseting og prent: **P/f Sosialurin**
Bústaður: **Argjavegi 26 Argjum**

Postadr.: **Postsmoga 76 110 Tórshavn**
Telefon: **11820**
Telefax: **14720**

Internet: http://WWW.cybernet.dk/faroe-news e-mail: sosialur@olivant.fo

Spennandi men eisini álvarsom tíð

Oddagrein

EIN týðandi partur av tí næsta kapittlinum í føroysku oljusøguni varð liðugt skrivaður í gjár, tá heimsins størsta seismiska felag Western lat føroyskum myndugleikum frágreiðing sína um tað seismiska arbeiði hetta felag hevur gjørt seinastu tvey til trý árini.

ÚRSLITINI av hesi kanning eru sera áhugaverd og bendir okkurt á, at olja og gass er í undirgrundini. Spurningurin er, hvar tað er og í hvussu stórum nøgdum.

UM somu tíð sum henda frágreiðing verður latin myndugleikunum fer eitt skip út á føroyaleiðirnar at skjóta meira seismikk við tí endamáli at útvega trimum stórum oljufeløgum svarið, hvar hesi feløg skulu seta borin í, tá tey fáa loyvi frá føroyskum myndugleikum at bora.

Í veruleikanum eru hetta stórhendingar, sum áttu at fingið føroyingar og ikki minst okkara politikarar at rakna við. Her er talan um so kollosalt stórar avbjóðingar – uppá gott og ilt – at tað er ein ábyrgdarleysur politikari, sum ikki gevur hesum gætur. Ein møgulig komandi oljuvinna kann koma at broyta okkara samfelag so nógv, at tað er skyldan hjá teimum fólkavaldu at bruka orku, vit og skil - til at stýra hesi nýggju vinnu. Væl kann ein siga, at talan enn bert er um forkanningar, men tá trý av heimsins størstu oljufeløgum kunngera, at tey eru tilreiðar at bora við Føroyar longu í næsta ár, tá eigur hetta av røttum at fara sum skjálvi gjøgnum alt okkara samfelag. Soleiðis at skilja, at vit tá eiga at seta okkum spurningin: eru vit tilreiðar at taka ímóti hesi nýggju vinnu, megna vit at stýra henni og hava vit í heila tikið gjørt okkum greitt, hvat tað er vit vilja.

ØLL vilja vit gera tað meira liviligt í hesum landi og tað vil m.a. siga at útvega arbeiðapláss. Virksemið í sambandi við eina komandi oljuvinnu kann hava stóran tydning í so máta. Tað er tí eisini heilt nátúrligt, at vit leita eftir nýggjum tilfeingi at troyta, og har kann olja í undirgrundini vera eitt av teimum. Umframt tað at "neyðin lærir nakna kvinnu at spinna", so er tað eisini áhugi fyri og spenningur um tað ókenda, sum drívur verkið. Hetta kenna vit eisini frá føroyskum fiskimonnum, sum hava verið pionerar á fleiri nýggjum fiskileiðum.

TAÐ, sum umræður nú, er, at vit føroyingar gera okkum greitt, hvat, ið er við at henda og spyrja okkum sjálvi, hvussu vit best stýra útviklinginum, soleiðis at han n kemur at gagna fyrst og fremst okkasra samfelag og okkara eftirkomarum. Oljufeløgini leita ikki eftir olju fyri okkara skyld. Tey gera tað fyri egnan profitt. Men er olja har, so eiga VIT hana. Hetta vita oljufeløgini, og tí vænta tey eisini, at tað verða vit, sum seta út í kortið.

MEN hvat mótspæl hava vit so at geva oljugigantunum! Hvussu tryggja vit okkum, at vit ikki verða snýtt! Hetta eru spurningar, ið politikarar og onnur eiga at seta sær nú. Hvussu brynja vit okkum út til at møta hesi stóru avbjóðing! Hava vit fólk, sum eru før fyri at samráðast við professionellu oljufólkini um, hvussu køkan verður býtt! Vit bíða spent eftir oljufrágreiðingini. Einki er at bíða eftir. Politikarar: stingið fingurin í jørðina.

Sosialurin

Dorit Bjarnarson, skrivari Fiskepigernes Fagforening:

Ogur virka í felag – draga somu línu

Vit prenta her røðuna, sum skrivarin í Fiskepigernes Fagforening, Dorit Bjarnarson skuldi halda 1. mai á Tvøroyri. Hetta haldið varð sum kunnugt avlýst

Hesin dagurin er ogra – henda dagin kunnu arbeiðarafeløg kring allan heim, við røðum og skrúðgongum, markera tað sum feløgini standa fyri. Ogra felag er eitt av heimsins elstu kvinnuligu fakfeløgum. Fiskepigernes Fagforening er stovnað fann 22. jan. 1922.

Og hevur verið virkið síðan. Ikki bara sum fakfelag, men eisini eitt felag, sum hevur sett nógv arbeiðsskapandi virki í gongd.

Øll árini hava ogur havt eitt samstarv við Fylking – til framburð og gagn fyri Tvøroyri.

Ogur hava við løgtingslóg fingið skrásett javnstøðu.

Fyri ogra viðkomandi var ikki neyðugt við einari slíkari lóg. Tí her hjá ogum hevur tað verið soleiðis, at ogur virka í felag. Ogur draga eina línu. Fylking og Fiskepigernes Fagforening eru felags, tá ið tað eru tiltøk, sum skapa arbeiði og framburð.

Ogur hava havt eitt samarbeiði og tað fara ogur framvegis at byggja ogra tilveru á.

Grundarlagið undir einum felag sum ogra er, at tað verða skaptir møguleikar fyri arbeiði til so nógvar hendur sum gjørligt bæði á sjógvi og landi.

Tað var grundarlagið, sum ogra forfedrar løgdu – og í takksemi fyri tað, sum tær gjørdu, byggja ogur víðari á tað, sum tey hava gjørt.

Tað er væl eingin betri enn ein kvinna, sum dugir at umsita.

Hon er fyrst mamma, og sum slík hon sum skal fáa endarnar at røkka saman.

Og hetta hevur hon sum útiarbeiðandi í verki prógvað.

Føroya Arbeiðarafelag og øll hini feløgini er nú farin undir samráðingar um nýggjan sáttmála.

Krøvini frá ogum í hesum ringu tíðum eru ikki stór.

Um at ogur fáa somu sømdir, sum tey fastløntu hava fingið, viðvíkjandi frítíðarløn og longda feriutíð.

Um hetta verður framt – so eru ogur nøgd.

Við ynski um arbeiði til allar hendur bæði á sjógvi og landi ynskir Fiskepigernes Fagforening tvøratólki, ja, øllum Føroyum eitt gott summar.

Dorit Bjarnarson,
skrivari í
Fiskepigernes
Fagforening

Tórshavnar kommuna søkir eftir

leiðarum

við pedagogiskari útbúgving
til

Býlingshúsið millum Gilja

Býlingshúsið á Flat

Býlingshúsið undir Brúnni

at byrja 1. juni 1996

Býlingshúsini eru ein partur av kommunalu býlingshússkipanini.

Býlingshúsið á Flat er nú normerað til 22 barnagarðsbørn og 12 vøggustovubørn.

Býlingshúsið undir Brúnni er nú normerað til 34 barnagarðsbørn og 10 vøggustovubørn.

Býlingshúsið millum Gilja er nú normerað til 40 barnagarðsbørn.

Lønin samsvart galdandi sáttmála.

Tygum fáa meira at vita um størvini frá leiðaranum á Býlingshúsunum millum Gilja, tlf. 18372, á Flat, tlf. 18626, undir Brúni, tlf. 1[illegible]480, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 15160, og Karin Jacobsen, lønarfulltrúa, tlf. 15160.

Umsóknir verða at senda Tórshavnar býráð, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 17. mai 1996. Við umsóknini eiga at verða løgd avrit av prógvum og møguligum viðmælum.

Tórshavnar býráð

Mariusystir Josuana vitjar í Føroyum 5.–14. mai 1996

Skrá:

Sunnukvøldið **5. mai kl. 18.00:**
Meinigheitshúsið í Tórshavn

Mánakvøldið **6. mai kl. 20.00:**
Skála Missiónshus

Týskvøldið **7. mai kl. 20.00:**
Glyvra Missiónshús

Mikukvøldið **8. mai kl. 20.00:**
K.F.U.M. og K. í Klaksvík

Hóskvøldið **9. mai kl. 20.00:**
K.F.U.K. í Tórshavn

Leygarkvøldið **11. mai kl. 20.00:**
Aglow – Læraraskúlin, Tórshavn

Sunnukvøldið **12. mai kl. 20.00:**
Missiónshúsið í Vestmanna

Týskvøldið **14. mai kl. 20.00:**
Missiónshúsið í Sørvági

Kanaanvinir í Føroyum

Bingotølini í dag:

20	86